# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: - Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v/bandsp. v.m. Bert 1. ár og 5. mán. Seldur vegna keyp av 7. pers. bili. Kr. 175.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl- Spoylara aftan - Alufelgur - v.m. Kr. 66.000. Tilboð uttan bil í býti kr. 52.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition-Alufelgur-Fjarstýrt centrallás- El-rútar-El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL STATIONCAR**
Árg 08.Juni 95, Km 138.400. Centrallás - El-rútar - El-spegl -Radio v.bandspælara og CD Boks -. Kr. 78.000.



**NISSAN PRIMERA 1.6**
Árg Dec.1990, Nýsýnaður - Sleipikrók- Alufelgur v.m. Tilboð kr. 20.000,-. Kr. 30.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Automatisk gear- Centrallás- El-rútar- El-spegl- Radio v/bandspælara. Kr. 78.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 10. Apríl 96, Km 70.000. Sera vælhildin: Automatisk gear - C.D.Anlegg - Centrallás - El-rútar - El-spegl v.m. Kr. 85.000.



**PEUGEOT EXPERT 2.0 HDI 8.PERSÓNAR**
Árg Jan-03, Km 12.900. Selist vegna keyp av 4.Hjólstrekkjara. Sum nýggjur: Alufelgur- Eyka vetrarsett-Tónaðar rútar-El-rútar-El-spegl- Fj.stýrt centrallás-C.D. Anlegg-Sleipikrók v.m. Kr. 258.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Leverast nýsýnaður. Kr. 28.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept. 2001, Km 20.700. Aircondition - El-rútar - El-spegl v.hita - Radio - Fjarstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Tilboð kr. 138.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg 17 Jan. 1997, Km 49.000. Fjarstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Radio v/bandspælara eyka tectylviðgjørdur. Selist vegna flyting til Danmark. Kr. 58.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El.Sóltak- Centrallás- El-rútar- El-spegl- Radio v/bandspælara - Eyka hjólsett v/píkum. Kr. 67.000.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

GERIÐ KVETTI!
Jóla-innkeyp í Hetlandi

Kom við Norrönu til Hetlands, har góðir møguleikar eru at keypa inn til jóla fyri sera sámiligar prísir. Vel ímillum fráferð mánadag ella hósdag við ávikavist einari ella tveimum hotelgistingum.

Mánadag til hósdag úr kr. 1.000,-
Íroknað prísin er ferðin fram og aftur við Norrönu og uppihald 1 nátt í dupultkamari á hotelli í Lerwick, íroknað morgunmat.

Hósdag til mánadag úr kr. 1.500,-
Íroknað prísin er ferðin fram og aftur við Norrönu og uppihald 2 nætur í dupultkamari á hotelli í Lerwick, íroknað morgunmat.

Kvøldið kanst tú nýta til at síggja nakað av tí, Lerwick hevur at bjóða sínum vitjandi, eitt nú trongar gamlar steingøtur við hugnaligum matstovum, krambúðum, vertshúsum og eitt kaiøki við nógvum virksemi. Í Lerwick eru eisini støð og bygningar av søguligum og mentanarligum virði, sum *Clickimin Broch*, *Fort Charlotte*, *Bod of Gremista* o.m.a.



Í november og desember verður – fyri tey sum búgva á Shetland- og Lerwick Hotel – givin eyka avsláttur í ávísum handlum í Lerwick.

SMYRIL LINE

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Petur Z. Hentze**
Tórshavn, ættaður av Sandi

andaðist mánadagin 24. november, 60 ár gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

*Tey, ið ynskja at minnast Petur, kunnu lata eina gávu á konto í peningastovnunum*

†

Okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma

**Karen Elise Djurhuus**
Neslíð, Vágur

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsmorgunin 25. november 77 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin 29. november kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Leif, Laura og Johan**



# Alternativ vinna við góðum baklandi

**Á skeljaráðstevnuni í Mullers Pakkhúsi og Norðurlandahúsinum seinasta vikuskiftið skiltist týðiliga, hvussu stóran dent grannatjóðir okkara leggja á alternativa vinnu. Í summum førum viðvirka fleiri stovnar til, at ein nýggj vinna fær møguleikar at fóta sær. Føroyingar, sum hava roynt at byggja upp eina krabbavinnu í Føroyum, noyðast at ásanna, at í Føroyum hava teir einki bakland aftanfyri seg**

ALTERNATIV VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað var Birgir Enni, sum saman við Árna Nicolajsen skipaði fyri norðurlendsku skeljaráðstevnuni í Føroyum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sosialurin fylgi einum parti av norðurlendsku ráðstevnuni, sum var í Mullers Pakkhúsi og Norðurlandahúsinum seinasta vikuskiftið.

Hugvekjandi var at hoyra, hvussu nógv sviar og norðmenn gera burtur úr at reisa eina krabbavinnu á føtur. Tað var eisini áhugavert at hoyra, hvussu nógv íslendingar hava gjørt burtur úr royndunum at ala krækling.

Hóast royndin at fáa nýggjar vinnur upp at standa kann vera trilvandi og stundum illgongd, má tað tó kennast sum ein styrkur, at samfelag og stovnar stuðla undir við teimum miðlum, sum nú einaferð kunnu hugsast.

Á ráðstevnuni greiddi Anette Ungfors frá einari krabbaverkætlan í Svøríki, og Astrid Woll greiddi frá eini slíkari í Noregi.

Hesar verkætlanir snúðu seg í báðum førum um taskukrabba, og felags fyri tær er, at fleiri stovnar standa aftanfyri royndina at byggja upp hesa nýggju vinnu.

ES stuðlar svensku ætlanini við tilsamans 4 milj. krónum, og tað hildu sviar vera ov lítið.

Men eitt er beinleiðis stuðulin, ið veittur verður; annað er moralski stuðulin, sum vísir seg, tá ið tað almenna og stovnar við tilknýti til vinnuna viðvirka.

Bæði í Svøríki og Noregi er talan um útróðrarmenn, sum í vertíðini veiða krabba. Hetta eru menn, sum royna við gørnum ella øðrum fiskireiðkapi uttanfyri krabbavertíðina.

Uppi á landi skipa stovnar fyri, at ymiskar rúsur verða royndar, og stórur dentur verður lagdur á, at arbeiðsumstøðurnar umborð á bátunum eru góðar, soleiðis at krabbaveiðan ikki gongur út yvir menninar likamliga.

Royndir verða eisini gjørdar við ymiskum framleiðslum, og arbeitt verður við at marknaðarføra krabbavørurnar, bæði heima og úti.

Nýggj tøkni verður ment til framleiðsluna, og skrásetingar av øllum møguligum slagi verða framdar.

Í Føroyum eru royndir gjørdar at reisa eina krabbavinnu á føtur, og so seint sum í summar er seinasta royndin gjørd.

Men her hjá okkum verður einki stórt "apparat" sett í gongd til tess at stuðla uppundir eina slíka roynd.

Menninir, sum keypa skip til endamálið og leiga seg inn á eitt virkið at virka krabban til útflutnings, standa við ongum baklandi.

Fiskirannsóknarstovan hevur av sínum eintingum og sum frægast fylgt hesum og øðrum krabbaroyndum upp, men teir, sum gera íløgurnar og royna at fóta sær í nýggju vinnuni, eru annars sleptir uppá fjall. Teir fáa nóg illa ein kreditt frá bankunum at arbeiða við.

Ein hálv miljón, sum verður játtað til sjálva royndarveiðina, røkkur ikki langt, tá ið tú skalt taka tær av øllum tí praktiska, bæði umborð og uppi á landi.

Á ráðstevnuni greiddi íslendingurin, Valdimar Lindblad, frá kræklingaaling í Íslandi. Hóast tonsatalið av aldum kræklingi í Íslandi bert er eitt tons um árið, skiltist á frágreiðing hansara, at nógv hevur verið gjørt til tess at fylgja hesi royndini upp – bæði á ein og annan hátt.

Danin, Karsten Krog, spurdi íslendingin, hvat tað nyttar hjá teimum at ala eitt tons av kræklingi við so nógvum stríði, sum íslendingurin hevði greitt frá, tá ið danir t.d. kunnu ala 100.000 tons av kræklingi – bara í Limfjørðinum!

Og so kortini vilja íslendingar gera hesar royndir – við luttøku av ymiskum stovnum.



*Egil Olsen og Hans Andrias Joensen skifta orð um ymiskt, ið frammi hevur verið á ráðstevnuni.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tveir fyrrverandi løgmenn, Edmund Joensen og Pauli Ellefsen, lýddu á, meðan sviar og norðmenn greiddu frá um royndir sínar at veiða og virka krabba.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*